## Minorka

Spanska oyggin í Miðalhavinum kann reypa sær av 88.000 íbúgvum. Størsti býurin á Minorka er Mahon, har sløk 30.000 fólk búgva. Flestu fólkini tosa spanskt og menorqui, sum er ein variatión av baskiskum. Minorka er nýggj oyggj á Oyggjaleikunum og luttók fyrstu ferð fyri tveimum árum síðani á Rhodos. Tá megnaðu ítróttarfólkini av Minorka at vinna 31 heiðursmerki – av teimum vóru 11 úr gulli.



## Orkney

Orkneyoyggjarnar teljast millum okkara nærmastu grannar. Oyggjarnar liggja sunnanfyri Hetland, stutt norðan fyri bretska meginlandið. 70 oyggjar eru á Orkney, og av teimum búgva fólk á 20 oyggjum. Samanlangt búgva sløk 20.000 fólk á Orkney, sum verður roknað sum sættstørsta skotska oyggin. Størsta búsetingin er í Kirkwall. Orkney telist millum tær oyggjarnar, sum ikki plaga at vinna so nógv heiðursmerki á Oyggjaleikum – seinast gjørdist tað til 4 heiðursmerki.



# ns Asbjørn er gulir

### FAKTA

**Hesi umboða Føroyar í bogaskjóting á Oyggjaleikum**

**Compound**
Albert Dam
Jógvan Niclasen
Magnus Andreassen
Hans Asbjørn Eysturdal
Sigrid Vang
Rakul Dam
**Recurve**
Absalon Hansen
Eirikur í Jákupsstovu
Hans Petur Højgaard
Eggaba Andreasen
Annika Vang
Jastrid M. Jensen

